# Trølla Omman ætlar at leypa av Ennibergi



Um veðrið er til tað, so ætlar Trølla Omman at leypa av Ennibergi beint eftir døgurða hósdagin. Trølla Omman hevur altíð verið ein heilt serlig omma og hesa avbjóðingina ræðist hon heldur ikki. Omman hevur fyrr lopið úr tyrlu við fallskíggja, men hesaferð rennur hon við fullari ferð, sum einhvør annar BASE-jumpari, út av Ennibergi. Ætlanin er at filma hesa stórhending, og skal tað brúkast í komandi filmi við Trølla Pæturi. Í ommuni hesaferð verður amerikanarin Mike Berwick. Mike er 30 ára gamal og kemur úr bynum St. Paul í Minnesota. Hann undirvísir eisini í fallskíggja-útlopi. Tað er fyritøkan MBM sum hevur bjóðað Mike til Føroyar.

# Haldi meg til fakta og ikki søgur



*- Eg haldi, at vit eiga at hava álit á sjóbjargingini, men kemur landsstýrismaðurin til, at viðurskifti kundu verið øðrvísi, verður tann spurningurin tikin upp, og støða verður tikin til, hvat skal gerast, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Bjørn Kalsø hevur sínar tankar um alt, sum fram er farið í sambandi við bjargingarroyndina av russiska trolaranum Olshanu. - Nú so nógv kunning hevur verið um hendingina, havi eg merkt mær, at mótsagnir eru í ymiskum av tí, ið sagt hevur verið**

OLSHANA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag klokkan 13 byrjaði fundur á MRCC Tórshavn við Tinghúsvegin, har mett verður um bjargingina og handfaringina av málinum, tá russiski trolarin Olshana fór á land og fórst við Flesjarnar seinasta fríggjamorgun. Á fundinum skuldu allir partar vera umboðaðir, sum vóru við í átakinum.

Longu mánadagin hevði landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, fund við tey, sum standa aftanfyri tilbúgvingina, har hesi høvdu høvi at greiða landsstýrismanninum frá teimum avgerðum, sum tiknar vórðu, og hvat lá til grunds fyri tiknu avgerðunum.

## Skjót kunning

- Tað var eg, sum bað um hendan fundin, sum soleiðis var stutt eftir átakið. Ein eftirmeting er partur av slíkum arbeiði, og eg havi eisini roynt at fingið partarnar at hava eftirmetingina so skjótt sum til ber. Hendan verður so í dag.

Bjørn Kalsø vísir á, at hann eisini hevur fylgt væl við tí, sum sagt hevur verið úr sjórættinum í gjár.

- Landsstýrismaðurin er ikki við á eftirmetingarfundinum í dag, tí ætlanin við hesum fundi er, at allir partar frítt skulu kunna siga sína hugsan um átakið. Landsstýrismaðurin er heldur ikki áhoyrari í sjórættinum.

## Biður um innlit

Bjørn Kalsø sigur, at hann sum landsstýrismaður við ábyrgd fyri økinum kann biðja um innlit í tilfarið frá eftirmetingarfundinum, og tað fer hann sjálvandi at gera.

- Væntandi verður eisini ein frágreiðing skrivað frá eftirmetingarfundinum, og hesa fer landsstýrismaðurin eisini at biðja um innlit í.

Bjørn væntar tó ikki, at almenningurin fær innlit í hesa frágreiðing, tí tey, sum við eru, skulu vera vard, soleiðis at tey kunnu tosa opið um alt, ið fram er farið.

Eftir fundin, sum landsstýrismaðurin hevði við partarnar, sum stóðu aftanfyri bjargingina av Olshanu, segði hann seg framvegis hava álit á sjóbjargingini.

- Eg haldi, at vit eiga at hava álit á hesum stovnum, men kemur landsstýrismaðurin til, at viðurskifti kundu verið øðrvísi, verður tann spurningurin tikin upp, og støða verður tikin til, hvat skal gerast.

## Ymiskar mótsagnir

Sjálvur sigur Bjørn Kalsø seg hava sínar tankar um alt, sum fram er farið, og nú so nógv kunning hevur verið um hendingina og bjargingarroyndina, hevur hann merkt sær, at mótsagnir eru í ymiskum av tí, ið sagt hevur verið.

- Tað, sum eg við ábyrgd fyri hesum partinum av tilbúgvingini, haldi meg til, er fakta – og ikki søgur, sigur landsstýrismaðurin.

# Skipaeftirlitið fær sjófrágreiðingina

**Sjórætturin er hoyringsrættur, har tey, ið verða avhoyrd, fáa høvi at góðkenna sína egnu frágreiðing, áðrenn hon fer víðari til aðrar stovnar og myndugleikar**

SJÓFRÁGREIÐING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sjórætturin, sum var týsdagin í sambandi við skipsbrotið við russiska trolaranum Olshanu, er í fyrsta lagi ein hoyringsrættur.

John í Soylu, sum starvast á Skipaeftirlitinum, sigur, at stovnurin plagar at fáa skrivaðu frágreiðingina frá sorinsskrivaranum nakrar fáar dagar eftir, at sjórætturin hevur verið.

- Tey, sum geva frágreiðing, sleppa at hoyra sína egnu frágreiðing lisnað upp. Frágreiðingin verður skrivað so hvørt. Fólk fáa soleiðis eisini høvi at góðkenna sína egnu frágreiðing.

John sigur, at honum kunnugt fær løgreglan eisini avrit av frágreiðingini, og samstarvið millum Skipaeftirlitið og løgregluna er gott.

- Eru mál, sum krevja gjølligari viðgerð, er ikki óvanligt, at Skipaeftirlitið og løgreglan viðgera viðurskiftini saman, um mett verður, at tað tænir málinum, sigur hann.



*Nú fer málið um skipsbrotið við Olshanu víðari til aðrar stovnar og myndugleikar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*